52-115/2019

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 115/2019 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, um avtalur við privatar fyritøkur um at kanna ferðafólk fyri COVID-19, lógarheimild, kostnað, ognarviðurskifti v.m.

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hvør hevur samráðst og gjørt avtalur við tvær privatar fyritøkur um at áleggja ferðafólki at lata seg kanna fyri COVID-19 á flogvøllinum og við havnir?
2. Hvør hevur undirskrivað sáttmálarnar, hvør landsmyndugleiki ella heilsufakligur myndugleiki hevur góðkent teir – og kann løgmaður senda løgtingsfólki avrit av øllum viðkomandi skjølum og upplýsingum í málinum?
3. Hvørjar fyritøkur er talan um, hvør eigur fyritøkurnar, hvør situr í nevndunum fyri hesar fyritøkur, hvørji læknafaklig/heilsufaklig fólk eru knýtt at fyritøkunum og hava fakliga ábyrgd?
4. Nær, hvar og hvussu er arbeiðið boðið út?
5. Hvør er lógarheimildin fyri hesum avtalum, og hvør er lógarheimildin fyri at krevja, at fólk at taka royndirnar?
6. Hvør hevur ásett kostnaðin – og hvat verður mett, at ferðafólk fara at gjalda tilsamans í milliónum krónum fyri royndirnar, um kravið til dømis verður galdandi frá 27. juni 2020 til 1. oktober 2020?
7. Hvussu stórur er vinningurin hjá fyritøkunum fyri hvørja roynd – og hvussu nógv verður vinningurin mettur at verða tilsamans hjá fyritøkunum fram til 1. oktober 2020?
8. Hvør heilsumyndugleiki hevur góðkenning, eftirlit við trygdini hjá borgarum um persónupplýsingar, og uppfylging mótvegis borgarum um hendi – og hvørjar avtalur og skjøl eru gjørd um hetta og nær?
9. Hvør er støðan hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og sjúkrahúsmyndugleikunum til hesar avtalur, og um Heilsufrøðiliga Starvsstovan og sjúkrahúsini fingu tann pening, ið nú skal til privatar fyritøkur, hvussu kundu tey tá ment seg og staðið fyri kanningunum?
10. Ætlar løgmaður at fremja fráboðaðu ætlanina, og hvør hevur landsstýrismannaábyrgd fyri avgerðunum?

Svar:

Til 1: Heilsumálaráðið hevur skrivað undir samstarvssáttmálar við Sp/f Thetis og P/f Smyril-Line um COVID-19 kanningar. Við sáttmálunum hava partarnir lagt fastar karmar um samstarvið, soleiðis at COVID-19 kanningarnar av ferðafólki verða gjørdar á besta og tryggasta hátt.

Til 2: Tað er aðalstjórin í Heilsumálaráðnum og stjórarnir í ávikavist Sp/f Thetis og P/F Smyril-Line, sum hava undirskrivað samstarvssáttmálarnar ávikavist 24. og 25. juni 2020.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Tá ið tað viðvíkur samstarvssáttmálan við Thetis um at gera COVID-19 kanningar í Føroyum av ferðafólki, er tað Heilsuverk Føroya, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, ið stendur fyri kanningunum. Pál Weihe, yvirlækni og leiðari fyri Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, er ábyrgdarhavandi yvirlækni fyri kanningunum. Thetis og tey starvsfólk, ið gera potingar, arbeiða eftir delegatión frá Pál Weihe, jb. § 18 í autorisatiónslógini (anordning nr. 1472/2013) og bekendtgørelse 613/2014 om autoriserede sundhedspersoners benyttelse af medhjælp. Pál Weihe skal tryggja, at tey starvsfólk, ið testa tey ferðandi, eru skikkaði til at røkja uppgávuna og hava fingið vegleiðing frá honum í at gera testirnar.

Tá ið tað viðvíkur avtaluna við Smyril Line um at gera kanningar av ferðandi, ið ferðast við Norrønu, er tað m.a. ásett í sáttmálanum, at Smyril Line skal tryggja sær, at kanningarstova, eftir delegatión frá lækna, ger kanningarnar. Tey starvsfólk, ið arbeiða við at gera COVID-19 kanningarnar, arbeiða eftir delegatión frá lækna sambært autorisatiónslógini og "bekendtgørelse om autoriserede sundhedspersoners benyttelse af medhjælp". Smyril Line skal tryggja sær, at tey starvsfólk, ið testa tey ferðandi, eru skikkaði til at røkja uppgávuna og hava fingið vegleiðing frá lækna at gera testirnar.

Ikki er vanligt at senda løgtingsfólkum sáttmálar, sum fyrisitingin ger, men avrit fæst við at venda sær til Heilsumálaráðið. Fjølmiðlarnir hava longu fingið alment innlit í sáttmálarnar.

Til 3: Hesir upplýsingar eru almont atkomiligar í leitiskipanini á skraseting.fo. Innanhýsis skipanina av felagnum má stjórnin har svara fyri.

Til 4: Arbeiðið er ikki boðið út av tí, at skotbráið er stutt, og bara heilt fáar fyritokur í Føroyum eru forar fyri at gera arbeiðið.

Til 5: Farsóttarnevndin hevur, sambært § 16, stk. 1 í epidemilógini, heimild at áleggja ollum, sum koma til Foroya í tíðarskeiðinum frá og við 27. juni til og við 10. juli 2020, at lata seg kanna fyri COVID-19 av einum lækna ella einum, sum arbeiðir eftir delegatión frá lækna.

Til 6: Kostnaðurin er ásettur í samstarvsáttmála, sum í verandi líki er galdandi frá 27. juni til og við 10. juli 2020. Hetta tíðarskeið koma ferðafólk onki at gjalda fyri royndirnar. Um farsóttarnevndin avgerð at haldast skal fram við hesum kanningum eina tíð aftrat, fer landsstýrið eisini at rinda fyri hesar. Í samstarvssáttmálanum hava partarnir avtalað ein prís uppá ávikavist 390 og 500 kr. fyri hvørja vanliga COVID-19-roynd, sum verður gjørd. Eina ferð um vikuna verður rokning send Heilsumálaráðnum. Tað er sera trupult fyri ikki at siga ómøguligt í dag at siga, hvussu støðan viðvíkjandi COVID-19 verður fram til 20. oktober 2020. Heilsufakligi myndugleikin fylgir støðuni alla tíðina, soleiðis at nýggjar ella tillagaðar avgerðir kunnu takast, so hvørt tørvur verður mettur at vera á tí.

Til 7: Sum kunnugt røkkur samstarvsavtalan fram til 10. juli og ikki 1. oktober 2020. Hvussu stórur vinningurin hjá fyritokuni er fyri hvørja roynd, hevur Heilsumálaráðið ikki innlit í.

Til 8: Tað er sum nevnt Heilsuverk Føroya, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, ið stendur fyri kanningunum av ferðafólki í Føroyum. Pál Weihe, yvirlækni og leiðari fyri Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, er ábyrgdarhavandi yvirlækni fyri kanningunum. Thetis og tey starvsfólk, ið gera potingar, arbeiða eftir delegatión frá Pál Weihe, yvirlækna. Dátueftirlitið hevur góðkent hesa verkætlan.

Í sáttmálanum við Smyril Line er ásett, at tey skulu tryggja sær, at tey starvsfólk, ið arbeiða við at gera COVID-19 kanningarnar, arbeiða eftir delegatión frá lækna sambært autorisatiónslógini og "bekendtgørelse om autoriserede sundhedspersoners benyttelse af medhjælp". Smyril Line skal tryggja sær, at tey starvsfólk, ið testa tey ferðandi, eru skikkaði til at røkja uppgávuna og hava fingið vegleiðing frá lækna at gera testirnar.

Av tí at sáttmálin fevnir um kanningar, ið verða gjørdar í Danmark, er ásett, at Smyril Line skal tryggja sær, at ásetingar í danskari lóggávu um vernd av persónsupplýsingum eru hildnar.

Sáttmálarnir áseta eisini, at kanningarstovurnar, ið gera COVID-19 kannningarnar, einans hava pseudonymiseraðar persónupplýsingar um hendi, og sostatt m.a. ikki kunnu knýta kanningarúrslit beinleiðis til ávíst ferðafólk.

Um øll ferðafólk verða testað negativ fyri COVID-19, verða kanningarnar burturbeindar. Um eitt ella fleiri ferðafólk verða testað positiv fyri COVID-19, verða upplýsingarnar latnar til latnar til Landslæknan, sbrt. bekendtgørelse nr. 189 af 10. marts 2020 for Færøerne om lægers anmeldelse af COVID-19. Aftaná verða hesar kanningar burturbeindar.

Rættur til endurgjald fyri møguligan skaða í sambandi við kanning er reguleraður í galdandi lóggávu um klagu- og endurgjaldsmøguleikar innan heilsuverkið.

Til kunningar kann harumframt upplýsast, at Dátueftirlitið sambært persónsupplýsingarlógini hevur eftirlit við viðgerð av persónupplýsningum.

Til 9: Sjúkrahúsverkið hevur boðað frá, at tey ikki ynskja uppgávuna at kanna frísk ferðafólk, sum koma til landið. Um sjúkrahúsverkið skuldi staðið fyri hesi uppgávuni, hevði tað tikið orku frá øðrum uppgávum í sjúkrahúsverkinum, og tað ynskir leiðslan í sjúkrahúsverkinum ikki.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur higartil bert verið inni í myndini, hvat viðvíkur testing av eini fyriliggjandi roynd, sum er tikin og liggur í einum royndarglasi. Hon hevur sostatt ikki tikið sær av tí partinum, sum fevnir um at skipa fyri og fremja sjálva prøvatøkuna sonevndu podingina.

Til 10: Formligu avgerðina um at krevja kanning av fólkum, sum koma til landið, tekur farsóttarnevndin, sum virkar undir danskari skipan eftir lógini um smittandi sjúkur § 16.

Í Tinganesi, 3. juli 2020

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður